**From:** Malene Egeberg Jacobsen
**To:** Jóannes N. Dalsgaard
**Cc:** Sigurð í Jákupsstovu; Hilmar Høgenni
**Subject:** SV: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
**Date:** fríggjadagur, 25. juli 2025 11:16:32
**Attachments:** image001.png

---

Vísandi til niðanfyri standandi umbøn um viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um at geva Húsalánsgrunninum ræðisrætt til bygningin Eirargarður 2 í Tórshavn hevur Umhvørvisstovan fylgjandi viðmerkingar:

Sum viðmerkingarnar til lógaruppskotið vísa á, heimilar verandi tinglýsingar- og matrikullóggávu ikki, at ein samlaður fastur eigindómur verður avhendaður ella veðsettur fyri seg ella verður latin øðrum til brúks longur enn 10 ár, uttan so at matrikulmyndugleikin góðkennir sundurbýtið, so hesin partur verður frábýttur við egnum matrikkulnummari. Viðmerkingarnar vísa eisini á, at treytirnar fyri sundurbýti í hesum føri ikki eru til staðar.

Sambært tinglýsingarlógini ber tað ei heldur til at stovna bygningin Eirargarður 2, Tórshavn sum ein bygning á leigaðum øki, við tað at ognin longu er ein samlaður fastur eigindómur.

Sum skilst er endamálið við lógaruppskotinum, at Føroya Landsstýri sum eigari av matr.nr. 1000a Tórshavn ynskir at veita Húsalánsgrunnin ein tíðaróavmarkaðan nýtslu- og ræðisrætt til bygningin Eirargarður 2, Tórshavn. Nýtslu- og ræðisrætturin fevnir í høvuðsheitum um

- nýtslurætt til bygningin Eirargarður 2, Tórshavn og kringliggjandi øki, sum náttúrliga er knýtt at bygninginum, tó ikki niðastu hædd í bygninginum (§ 1)
- nýtsluavmarking við tað at bygningurin skal nýtast til lestrar- og ungdómsbústaðir (§ 2)
- skylduna hjá Húsalánsgrunninum at røkja og umsita bygningin og bera allan kostnaðin av hesum (§ 3, stk. 1)
- rættin hjá Húsalánsgrunninum at umbyggja og umvæla bygningin móti at bera allar útreiðslur í hesum sambandi (§ 3, stk. 2)
- forboð móti at Húsalánsgrunnin framleigar bygningin Eirargarður 2, Tórshavn (§ 4)
- loyvi hjá Føroya Landsstýri at áseta reglur og krøv í mun til útleigan (§ 5)

Aftrat hesum er ætlanin sambært § 6 í lógaruppskotinum helst at tryggja, at veð hjá einum lánveitara kann tinglýsast spesifikt í bygninginum Eirargarður 2, Tórshavn. Umhvørvisstovan skal í tí sambandi viðmerkja, at verandi tinglýsingar- og matrikkullóggáva ikki heimilar tinglýsing av slíkari veðseting. Umhvørvisstovan metir tí ikki, at lógaruppskotið veitir neyðuga heimild til endamálið, og ein umbøn um

veðseting av einum parti av matr.nr. 1000 a Tórshavn (Eirargarður 2) verður sambært galdandi tinglýsingarlóg burturvíst.

Umhvørvisstovan metir grundleggjandi ikki, at tað er ráðiligt at samtykkja eitt lógaruppskot, hvørs endamál partvís er at seta verandi tinglýsingar- og matrikkullóggávu úr gildi spesifikt í mun til ein bygning í hesum føri Eirargarður 2, Tórshavn.

Mælt verður í staðin til, at Føroya Landsstýri sum eigari av Eirargarður 2, Tórshavn ger avtalu við Húsalánsgrunnin um viðurskiftini samsvarandi ásetingunum í lógaruppskotinum. Avtalan eigur eisini at innihalda eina áseting um, at avtalan verður tinglýst sum byrðu á matr.nr. 1000a Tórshavn við átalurætt fyri Føroya Landsstýri og Húsalánsgrunnin í felag. Viðvíkjandi tørvinum á veðseting verður mælt til, at veðsetingin í samband við umbygging og umvæling verður veitt sum vanligt triðjamansveð, soleiðis at eitt veðbræv millum Húsalánsgrunnin og lánveitaran við loyvi/undirskrift frá Føroya Landsstýri sum eigari verður tinglýst á matr.nr. 1000a Tórshavn, sum trygd fyri skyldurnar hjá Húsalánsgrunninum mótvegis lánveitaran.

Við hesum leisti slepst undan at samtykkja eitt lógaruppskot, hvørs endamál partvís er at seta verandi tinglýsingar- og matrikkullóggávu úr gildi spesifikt í mun til ein bygning í hesum føri Eirargarður 2, Tórshavn.

Um spurningar ella ivamál eru, eru tit vælkomin at venda aftur.

Vinaliga

Malene Egeberg Jacobsen
Umhvørvisstovan
**Varastjóri**

Postboks 2048,
FO-165 Argir, Føroyar
tlf.: +298 342400
email: malenaj@us.fo
web: www.us.fo

**Hugsa um umhvørvið áðrenn hesin t-postur verður skrivaður út**
**Think about the environment before printing this email**

---

**Fra:** Jóannes N. Dalsgaard <JoannesNd@umhvorvi.fo>
**Sendt:** hósdagur, 24. juli 2025 13:41
**Til:** Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>; Atli Suni Leo <Atli@fmr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Bjørgfríð Ludvig <Bjorgfrid@hmr.fo>; Sigurð í Jákupsstovu <Sigurdj@us.fo>; us <us@us.fo>; Malene Egeberg Jacobsen <malenej@us.fo>;

bustadir@bustadir.fo; Teitur Samuelsen <tesa@estunlar.fo>; Jógvan Ósá <Jogvan@bustadir.fo>
**Cc:** Margit Stórá <MargitS@umhvorvi.fo>; Pól E. Egholm <pole@umhvorvi.fo>; Hilmar Høgenni <HilmarH@umhvorvi.fo>
**Emne:** Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
**Prioritet:** Høj

Góðan dag

Viðfest verður sent tykkum til ummælis uppskot til løgtingslóg umat geva Húsalánsgrunninum ræðisrætt til bygningin Eirargarður 2 í Tórshavn.

Løgtingslógaruppskotið skal gera tað møguligt hjá Húsalánsgrunninum at gera bygningin til lestrar- og ungdómsbústaðir at leiga út.

Ætlanin er at leggja uppskotið fram á Ólavsøku. Skotbráðið er tí ógvuliga stutt. Umhvørvismálaráðið heitir á tykkum um at senda okkum tykkara viðmerkingar **ikki seinni enn _í morgin_ fríggjadagin 25.07.2025 kl. 12:00**.

Vinaliga sendi viðmerkingar tykkara til undirritaða joannesnd@umhvorvi.fo.

Hava tit spurningar kunnu til venda tykkum til Hilmar Høgenni deildarstjóra á tlf. 558090.

Vegna Umhvørvismálaráðið
**Jóannes N. Dalsgaard**
fulltrúi

Telefon: +298 358700
Fartelef.: +298 734061
joannesnd@umhvorvi.fo

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

**Umhvørvismálaráðið**
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Telefon: +298 358700
www.umhvorvi.fo
umhvorvi@umhvorvi.fo